



» *Sjálv heldur Tita seg ikki hava havt eina meir listarliga tilgongd til vevhandverkið enn onnur. Tað er nakað, sum er komið við drúgvu royndunum og neyva innlitinum í sjálvt handverkið, heldur hon.*

royndir í at brúka tað. Tástani veist tú, hvussu langt tú kanst fara við tilfarinum og teknikkinum og kanst harfrá meta um, hvat hendir, um tú nú fert eitt lítið vet longur. Eg havi fingið handan spurningin onkuntíð fyrr, har eg havi svarað, at fyri at verða listafólk, mást tú vera ein góður handverkari. Men fyri at vera ein góður handverkari, mást tú hava ávís listarlig evni. Tað er nokk á leið soleiðis, tað hongur saman, sigur Tita og minnir á, at list kann vera so mangt og kann spretta úr so mongum. Hon vísir á, at nettupp pólsku vevararnir eru eitt gott dømi um, hvussu tú kanst gera ikki bara neyðsýn til dygd, men enntá til listarliga dygd.

– Teir hava neyvan havt ráð til tað dýra tilfarið, og tí vóru teir noyddir at brúka sovorðið sum hamp, jute og sissal, sum var bíligt og lætt at fáa hendur á. Men í staðin fyri at fjala tað, sum mann annars hevði gjørt fyrr í vanligu flatvevingini, lærdu teir seg at framheva eginleikarnar í tilfarinum á hátt, sum gav eitt heilt nýtt listarligt útrykk. Eg trúgvi, at nýskapan ofta er eitt úrslit av, at tú ikki ært fatur á tilfarinum, mann plagar at brúka, og so ert noydd til at finna upp á okkurt annað. Líka sum tá tú ikki eigur tað »rætta« kryddið inni og mást koyra okkurt annað í og soleiðis ært ein heilt nýggjan døgurðarætt burtur úr tí...

## Íblástur

Spurd um, hvussu hon sjálv fær íblásturin til síni vovnu verk, sigur Tita, at hugskotini kunnu koma allastaðni frá og ofta, tá tankarnir snúgva seg um okkurt heilt annað.

– Eg eri ikki ein, sum til dømis fari í hagan at ganga og leita mær eftir íblástri. Ikki tí, eg kann saktans fáa íblástur úr náttúruni, men eg geri tað ikki tilvitað. Eitt hugskot kann gott koma frá til dømis einum orði ella onkrum, eg síggi, sum eg so spinni víðari út frá, sigur Tita og greiðir sum dømi frá, hvussu hon fekk hugskotið til kenda vevlistaverkið »Santa Pæturs nót«. Hon var á eini framsýning í Ísrael, har hon sá eitt verk, sum ímyndaði bátin og fiskireiðskapin hjá Pæturi í Bíbliuni. Við bátin lógu nøkur petti av eini fiskinót, og Tita kom at hugsa um orðini hjá Jesus, tá hann segði við Pætur, at frá nú av skuldi hann fiska menniskju.

– Hendan hugmyndin um, at Pætur nú fór út at fiska menniskju við síni nót, gjørdi tað næstan upplagt at royna at knýta eina nót við tráði, vovnum úr menniskjahári, sigur Tita, sum ongantíð hevur aftrað seg við at nýta annað tilfar enn tað vanliga í síni veving.

– Onkur hevur verið eitt sindur illa við av, at eg brúki menniskjahár í summum av mínum verkum. Ivaleyst tí tey seta tað í samband við nazistarnar, sum jú vóvu lutir úr menniskjahári undir sera ræðandi umstøðum. Men eg kann vissa um, at hvørt einasta hár, eg havi brúkt, er komið av livandi fólkum, smílist Tita og minnir á, at menniskjahár hevur verðið brúkt at veva við gjøgnum allar tíðir.

Hetta við at fáa hugskot er annars ein eginleiki, sum má haldast við líka, er Tita sannførd um. Um tú ikki brúkar hann, dovnar hann burtur, eins og vøddar, sum ikki verða brúktir. Tí ræður tað allatíðina um at halda eygu og oyru opin, vera forvitin og opin fyri, at tað altíð finnast øðrvísi mátar at fara fram, enn teir vanligu.

## Takksom

Í út við 20 ár undirvísti Tita á vevskúlanum í Havn, og hon heldur tað vera hugaligt at síggja, hvussu stórur áhugin er fyri hesum aldargamla handverki. Tað sigur ikki so lítið, at vevholdini hava havt bíðilista á hvørjum ári, líka síðani tey byrjaðu í 1937. Tí má tað undra, at júst vevskúlin ongantíð veruliga hevur fingið røttu hølisumstøðurnar at virka í, men fleiri ferðir hevur verið mest sum húsvillur, sigur Tita.

Hóast Tita ikki longur undirvísir á vevskúlanum, er hon framvegis sera virkin við vevirnar. Í arbeiðsrúminum heima hjá Titu standa vevirnir á rað, og í teimum flestu er hon í holt við okkurt. Í løtuni arbeiðir hon fram ímóti eini framsýning á Ráðhúsinum í Keypmannahavn, og seinni í ár verður hon við á afturvendandi framsýningini »Dyr« umframt á Summarframsýningini í Norðurlandahúsinum.

Eftir eitt langt lív sum vevkona, heldur Tita tað vera trupult at taka nakað verk fram um onnur, sum hevur eitt serligt pláss í hennara minni. Men skal hon nevna okkurt, má tað verða teir báðir filmarnir, »Barbara« og »Her skal danses«, har Tita arbeiddi saman við kostumierunum við at gera leikbúnarnar. Av øðrum uppgávum, Tita er serliga fegin um at hava gjørt, kunnu nevnast Bispakápan umframt eitt stórsegl til Roskilde Bátasavn.

– Tað er so nógv annað, eg kundi nevnt, men sum sagt, er tað ringt at velja nakað bururtúr, tí allar uppgávurnar hava havt sín egna serstaka týdning. Men samanumtikið eri eg bara ómetaliga takksom fyri, at eg havi havt møguleikan fyri at sleppa at veva og alla ta hjálpina, eg havi fingið. Tað hevur verið so ríkt og gevandi, at eg ikki kundi ynskt mær tað betri, sigur vevkonan at enda.